KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 23.02.2023 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl H. Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna C. Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
9/23	23/00233-1	Tilmæli um at samtykkja afturgjaldsætlan
10/23	23/00033-3	Fyrireiking av byggistigi 2 og 3 á Skúlatrøð – byggibólkur og víðari tilgongdin
11/23	22/00992-12	Húsið aftur undir eina lon - Atlantis
12/23	22/01960-1	Regulering í grundstykkjaprísi
13/23	22/02058-3	Makaskifti millum matr.nr. 50t og p-plássið við Garðsenda
14/23	22/00531-17	Umskipan av matr.nr. 1646i undir Hamri
15/23	22/00847-17	Umsókn um frávik frá byggilinju - matr. nr. 1646i, Klaksvík - Looknorth
16/23	22/00888-3	Sveisirúm til Smiðjuna - flyting av óbúktari játtan
17/23	22/01562-8	Byggibúning ísv. hotellvirksemi í miðbýnum – kostnaður og sáttmáli
18/23	23/00180-1	Tunnilsgrót frá Norðhavnini til hotellverkætlanina
19/23	23/00181-1	Tunnilsgrót frá Norðhavnini til útfylling til bátafelagshús
20/23	23/00174-1	Flyta íløgu til fimleikarhøll til rakstrarstaðið stuðul til ítrótt – *fyrra viðgerð*
21/23	23/00175-3	Umsókn um prinsipp byggiloyvi til afturatbygging av aulu - matr. nr. 752b - Tekniski Skúli í Klaksvík

Til viðgerðar

9/23
23/00233-1 Tilmæli um at samtykkja afturgjaldsætlan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.02.2023	6/23
2 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	9/23

23/00233-1 Tilmæli um at samtykkja afturgjaldsætlan

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 15. feb. 2023, verður greitt nærri frá málinum.

Lýsing er av bankaskuldini og bindingunum móti peningastovnunum, herundir hvussu nógv kommunan rindar í lánsgjøldum árliga, og hvørja ávirkan hesi hava á netto avlopið í rakstrinum = disponiblu inntøkuna í roknskapinum hjá kommununi. Somuleiðis verður greitt frá gongdini í nettoskuld í mun til loyvdu skuld.

Útgangsstøðið er rakstrarroknskapurin hjá kommununi – inntøkur, rakstur, rentustuðul og avtalurnar kommunan hevur við fíggjarstovnar fyri einstøku lánini um afturgjalding. Og metingar/framrokningar eru gjørdar fyri 2022 – 2028 grundað á fíggjarætlanina 2023.

Víst verður annars til skrivið frá umsitingini.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 43.

Fíggjarligar avleiðingar:
Sambært lániavtalunum skulu 29 mió. kr. rindast í rentum og avdráttum komandi ár. Í ár er avsetingin 18,3 mió. kr.

Um dømi 1 verður fylgt, verður bankaskuldin ultimo 2028 260 mió. kr. og nettoskuldin 106 mió. kr. undir loyvda skuldarmarkinum.

Tá eru avsetingarnar til lánsgjøld (rentur og avdráttir), sum nevnt, á leið 30 mió. kr. pr. ár.

Tilmæli:
Mælt verður fíggjarnevnd og býráði til at samtykkja, at í árunum 2024 – 2028 verða settar 30 mió. kr. av árliga til rentur og avdráttir.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Tilmælið frá FíN 21-02-2023 einmælt samtykt.

10/23
23/00033-3 Fyrireiking av byggistigi 2 og 3 á Skúlatrød – byggibólkur og víðari tilgongdin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.02.2023	8/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	21/23
3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.02.2023	5/23
4 Tekniska Nevnd	15.02.2023	13/23
5 Fíggjarnevndin	21.02.2023	20/23
6 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	10/23

23/00033-3 Fyrireiking av byggistigi 2 og 3 á Skúlatrød – byggibólkur og víðari tilgongdin

Frágreiðing um málið:
Nú fíggjarætlanin fyri 2023 er endaliga samtykt, og vit eru farin um ársskiftið, verður málið um fyrireiking av byggistigi 2 og 3 á Skúlatrød við hesum lagt fyri allar avvarðandi nevndir og býráðið til eina fyrstu umrøðu og viðgerð.

Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2023 eru 500.000 kr. settar av til íløgujáttan skúlans, og hesaferð liggur tað í kortunum, at játtanin skal brúkast til at byrja tilgongdina at leggja tilrættis víðari byggistigini á Skúlatrød, sum nú í nøkur ár hava ligið still.

Talan er um eina drúgva viðgerðartiltongd, sum umfatar fleiri ymiskar nevndir, men høvuðsánarin av verkætlanini er Trivnaðarnevndin børn & ung, sum sambært kommunustýrisskipan kommununnar, vegna býráðið, varðar av skúlanum og játtanum skúlans.

Í samráð við nevndarformannin varð málið í januar lagt fyri trivnaðarnevndina børn & ung til eina fyrstu umrøðu av víðari tilgongdini, herundir manning av byggibólki ella fyrireikingarbólki, sum verður at manna í samráð við teknisku deild eftir teirra leiðreglum fyri økið.

Málið varð tí lagt fyri Trivnaðarnevndina børn og ung 17. januar 2023, har nevndin tók avgerð um at manna byggibólkin soleiðis: trivnaðarnevndarformaðurin B&U, borgarstjórin, trivnaðarnevndarlimur, skúlaleiðsla, læraraumboð, skúlastýrisumboð, trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, og FuglArk heldur fram í tilgongdini sum projkterandi ráðgevi.

Við hesum verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar við støði í omanfyri nevndu samtykt hjá TrN B&U, og har heitt verður á nevndir og býráðið um at útnevna umboðið fyri TrN B&U.

Lógargrundarlag:
Viðfest er tilmælið og samtyktin hjá TrN B&U, har samlaðu niðurstøðurnar hjá umsitingini undir lógargrundarlag er, at hetta byggimálið skal leggjast fyri TrN B&U (varðar av málsøkinum/innihaldinum og er høvuðsánari av verkætlanini), UBN (byggimyndugleiki og setur tilhoyrandi treytir og krøv til byggingina), TN (stendur fyri fremjingini av sjálvari byggingini), FeN (varðar av og ger tilmæli viðv. ferðsluligu viðurskiftunum), FíN (viðgerð serliga fíggjarliga og skipanarliga partin) og BýR (viðgerð og tekur støðu eftir tilmæli frá avvarðandi nevndum).

Henda tilgongd verður nú byrjað í Trivnaðarnevndini børn & ung.

Fólkaskúlalógin ásetur, at tað er kommunnnar skylda at útvega skúlanum umstøður til at veita næmingum skúlans eina nøktandi undirvísing.

Tekniska deild kommununnar hevur mannagongdir fyri, hvussu fyrireikingarbólkar og byggibólkar skulu mannast í sambandi við byggiverkætlanir.

Tá farið varð undir tilgongdina í 2014, var fyrireikingarbólkur mannaður við hesum persónum, ið tá vóru fleiri í tali, tí talan var tá um tveir skúlar, ið skuldu leggjast saman í ein: (1) Trivnaðarnevndarformaðurin (bólkaform.), *Borgarstjórin, *Trivnaðarnevndarlimur, *Skúlastjórin, *Varaskúlastjóri, *Læraraumboð, *Skúlastýrisforkvinnan, *Skúlastýrislimur, *Tekniski stjórin, *Trivnaðarstjórin og *Varatrivnaðarstjórin.

Í hesum umfari er talan ikki um eina byrjan, men um eitt framhald av byggitilgongdini, og tí er væl møguligt, at bólkurin skal setast saman á annan hátt.

Fíggjarligar avleiðingar:
Býraðið hevur játtað 500.000 kr. í 2023 til arbeiðið.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til viðgerðar við støði í omanfyri nevndu samtykt hjá TrN B&U, og har heitt verður á nevndir og býráðið um at útnevna umboðið fyri TrN B&U.

Ferðslunevndin 13. februar 2023:
Tilmælið, dagf. 03-02-2023, verið til kunningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Tilmælið, dagf. 03-02-2023, verið til kunningar.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 14. februar 2023:
Nevndin tekur undir við málinum dagfest 03.02.23, og at Jógvan Skorheim verður umboð fyri minnilutan.

Tekniska Nevnd 15. februar 2023:
Nevndin tekur undir við B&U 14-02-2023.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Nevndin tekur undir við TN 15-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Tilmælið frá FíN 21-02-2023 einmælt samtykt, og at Jógvan Skorheim umboðar býráðsminnilutan í byggibólkinum.

11/23
22/00992-12 Húsið aftur undir eina lon - Atlantis

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	22/23
2 Mentanarnevndin	14.02.2023	14/23
3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.02.2023	3/23
4 Tekniska Nevnd	15.02.2023	12/23
5 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	11/23

22/00992-12 Húsið aftur undir eina lon - Atlantis

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 1. feb. 2023.

Tað hevur í drúgva tíð verið sterkt ynski hjá leiðsluni fyri Húsið at savna alt virksemið hjá stovninum aftur undir eina lon. Hetta ynskið er grundað á ringar royndir av at hava virksemið á tveimum matriklum, har børnini eru á loftinum í Atlantis, meðan tey ungu hava hildið til í Dávavirkinum.

Í hesum umfari verður biðið um heimild til at senda stýrinum fyri mentanarhúsið eina áheitan um at lata kommununi Atlantis og at samráðast við stýrið um, á hvønn hátt kommunan best kann yvirtaka bygningin.
Tá svarið frá stýrinum fyriliggur, verður málið í mars mánað aftur lagt fyri nevndir og býráð til endaliga støðutakan. Møguliga verður talan um eitt eykajáttanarmál, sum fer at krevja tvær býráðssamtyktir.

Lógargrundarlag:
Eingin beinleiðis lóggáva er, sum regulerar virksemið í "Húsinum", hvørs virksemi sostatt ikki hevur nakað beinleiðis lógargrundarlag. Men við tað at talan er um tilboð av almennum slag, sum bæði aðrastaðni í landinum og í grannalondum okkara verða fíggjað av kommunum, og við tað at hesi tilboð verða veitt øllum borgarum í viðkomandi málbólkum, er talan um almannagagnlig tiltøk, ið sostatt ikki eru í stríð við nakra lóggávu, og sum fella innan fyri kommunufulltrúnna.

Fíggjarligar avleiðingar:

Spardar leiguútreiðslur:
Mánaðarligu útreiðslurnar av verandi leigumálum eru 39.313 kr. við mvg.

Í Dávavirkinum er talan um ein vanligan leigusáttmála við privatan eigara, sum kann sigast upp við 6 mð. varningi, um hetta tilmæli verður samtykt.

Í Atlantis er talan um eina leigu, sum er forút goldin av kommununi, við tað at kommunan í 2018 rindaði umleið 1,7 mkr. fyri umvæling av loftinum, ið verður roknað sum forút goldin leiga, ið verður mótroknað mánaðarligu leiguni á 12.500 kr.

Yvirtekur kommunan alt Atlantis, fær hon sum eigari nyttu og virði av nevndu umvælingarútreiðslum, samstundis sum leiguútreiðslurnar verða spardar. Sostatt lækka rakstrarútreiðslurnar, um málið verður samtykt – eisini tí rakstur undir einari lon er bíligari enn á tveimum matriklum.

Dagføringar av bygninginum:
Samstundis vil hetta krevja eina eingangs íløgu í Atlantis, so hølini hóska til virksemið hjá Húsinum.

Ein útgreining av hesum viðurskiftum er komin til eina kostnaðarmeting av at dagføra hølini til nýtsluna hjá Húsinum, sum ljóðar upp á góðar 550.000 kr.

Skyldur hjá verandi eigara av Atlantis:
Hesar verða tiknar upp í samráðingunum um yvirtøku av Atlantis, um so verður, at málið fær undirtøku.

Tilmæli:
Biðið verður um heimild til at senda stýrinum fyri Mentanarhúsið í Klaksvík eina áheitan um at lata kommununi Atlantis og í tí sambandi at samráðast við stýrið um, á hvønn hátt kommunan best kann yvirtaka bygningin. Tá svarið frá stýrinum fyriliggur, verður málið í mars mánað aftur lagt fyri nevndir og býráð til endaliga støðutakan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Ein meiriluti, GvK, OáL og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-02-2023.
Ein minniluti, JS, tekur ikki undir við uppskotinum og mælir til, at onnur hóskandi loysn verður funnin til Húsið.
SVJ tekur støðu í býráðnum.

Mentanarnevndin 14. februar 2023:
Ein meiriluti, GvK, ASB og JC, tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-02-2023.
Ein minniluti, ÓML, tekur undir við minnilutanum í UBN og at biografurin verður verandi í Klaksvík.
SVJ tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 14. februar 2023:
Ein meiriluti, EÓP, JC og ASB, taka undir við meirlutanum í MeN, dagf. 14.02.2023.
Ein minniluti, JS, tekur undir við minnilutanum í MeN, dagf. 14.02.2023.
TJL tekur støðu í býráðnum.

Tekniska Nevnd 15. februar 2023:
Ein meiriluti, OáL, EÓP og ASJ, tekur undir við meirilutunum í UBN 13-02-2023, MeN og B&U 14-02-2023.
Ein minniluti, ÓML, tekur undir við minnilutanum í MeN 14-02-2023.
TJL tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælini frá UBN 13-02-2023, MeN og B&U 14-02-2023 og TN 15-02-2023; tey fullu við 4 atkvøðum fyri (JS, TJL, SVJ og ÓML) og 6 atkvøðum ímóti (KHJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB); ASJ atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini frá UBN 13-02-2023, MeN og B&U 14-02-2023 og TN 15-02-2023; tey vórðu samtykt við 6 atkvøðum fyri (KHJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB) og 3 atkvøðum ímóti (JS, TJL og ÓML); ASJ og SVJ atkvøddu ikki.

12/23
22/01960-1 Regulering í grundstykkjaprísi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ánanevndin	31.01.2023	5/23
2 Norðoyrarnevndin	31.01.2023	3/23
3 Svínoyarnevndin	31.01.2023	3/23
4 Árnafjarðarnevndin	31.01.2023	3/23
5 Trøllanesnevndin	01.02.2023	3/23
6 Mikladalsnevndin	01.02.2023	3/23
7 Húsanevndin	01.02.2023	3/23
8 Syðradalsnevndin	01.02.2023	3/23
9 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	16/23
10 Fíggjarnevndin	21.02.2023	18/23
11 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	12/23

22/01960-1 Regulering í grundstykkjaprísi

Frágreiðing um málið:
Kommunalu grundstykkjaprísirnir í Kalsoy og Árnafirði eru nærum teir somu sum almenni snøklaprísurin (lendisprísur) hjá kommununi á 110 kr/m^2, og í Svínoy er fermetraprísurin 20 kr. lægri enn almenni snøklaprísurin.

Í uppskotinum niðanfyri verður Árnafjørður javnstillað við Norðoyri og Ánir við tí í huga, at tunlarnir norður um fjall í næstum verða tiknir í brúk, og farleiðin bøtt munandi.

Eingin almennur grundstykkjaprísur er staðfestur fyri Ánirnar**, og Svínoy verður javnstillað við Kalsoy.

Nevnast skal, at upprunin til fermetraprísin í flestu førum verður staðfestur sambært tí einstøku útstykkingarverktælanini. Fermetraprísur fyri grundstykki íroknað veg og íbinding til kommunalar leiðingar o.a. Tað verður altíð miðað eftir at hava fíggjarliga javnvág millum keyp og sølu av kommunalum lendi.
T.d. stava summir prísir í talvuni frá, tá ið nýggjar útstykkingar vórðu gjørdar t.d. Niðan Horn og Millum Hjalla.

Almennu grundstykkjaprísirnir verða nýttir í samband við umsóknir um keyp av lendi at leggja aftrat verandi grundstykki ella framhald av eini verandi útstykking. Ella tá kommunan sjálv skal ogna sær lendi til eitthvørt. Hugt verður at, um talan er um lendi í eini kommunalari útstykking t.d. millum Hjalla, ella um talan er um lendi í einum øðrum býlingi, tá ið fermetraprísur skal staðfestast.

Almennir prísir			
	Verandi prísur	Nýggjur prísur	Munur
Støð	kr./m^2	kr./m^2	kr./m^2
Klaksvík*	380	380	0
Klaksvík - Hamarssniðið	300	300	0
Klaksvík - Niðan Horn	600	600	0
Norðoyri	240	300	+60
Ánirnar	-	300	+300**
Árnafjørð	120	300	+180

Kalsoy	120	150	+30
Svínoy	90	150	+60
Snøkla-/lendisprísur	110	110	0

**Millum Hjalla og Undir Klakki*

Grundstykkir, sum longu eru á almenna sølulistanum hjá kommununi, verða ikki broytt.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrisskipanin

Fíggjarligar avleiðingar:
Økjan av fermetraprísi, sí talvu.

Tilmæli:
Uppskot til dagføring av grundstykkjaprísum verður lagt fyri nevnd til viðgerð og støðutakan.

Ánanevndin 31. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Norðoyrarnevndin 31. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Svínoyarnevndin 31. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Árnafjarðarnevndin 31. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Trøllanesnevndin 1. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Mikladalsnevndin 1. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Húsanevndin 1. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Syðradalsnevndin 1. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TF dagf. 23-01-2023.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 23-01-2023.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Nevndin tekur undir við UBN 13-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Tilmælið frá FíN 21-02-2023 einmælt samtykt.

13/23
22/02058-3 Makaskifti millum matr.nr. 50t og p-plássið við Garðsenda

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.02.2023	7/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	18/23
3 Tekniska Nevnd	15.02.2023	11/23
4 Fíggjarnevndin	21.02.2023	15/23
5 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	13/23

22/02058-3 Makaskifti millum matr.nr. 50t og p-plássið við Garðsenda

Frágreiðing um málið:
Klaksvíkar Býráð samtykti á fundi 27. oktober 2022 marknaumskipan millum matr.nr. 50ae og 2a og matr.nr. 50ae og 50t. - Parturin viðv. marknaumskipan millum matr.nr. 50t og 2a var ikki samtyktur, – hetta tí mann ikki ynskti at selja burturav almenna parkeringsplássinum.

Eigarin av matr.nr. 50t vendir sær nú aftur til kommununa – hesaferð við nærri frágreiðing um umsøkta ynski um marknaumskipan. Hann vísir á, at talan er um, at hann fær lagt afturat móti norðurmarkinum av ogn síni (matr.nr. 50t) lendi svarandi til ein parkeringbás (litað blátt) og afturfyri átekur sær at fremja og bera kostnaðin av at víðka almenna parkeringsplássið norðureftir við 2 básum (litað reytt).



Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Løgtingslóg nr. 64 um matrikulering og sundurbýti

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar
Lagt verður upp til avtalu, sum er treytað av, at kommunan verður hildin fullkomiliga útreiðslufrí av umskipanini.

Tilmæli:
Nú uppleggið er, at umsøkjarin sjálvur ber kostnaðin av at víðka verandi p-pláss við tveimum básum, hevur tekniska fyrisiting onki ímóti at játta matr.nr. 50t tilsøgn til ein 2,5 metra breiðan geira framvið suðurmarkinum av matr.nr. 2a - hetta tó treytað av,

- at kommunan verður hildin fullkomiliga útreiðslufrí av øllum arbeiðnum og umskipanini viðvíkjandi, og
- at marknaumskipanin ikki verður formaliserað, fyrrenn arbeiðið við víðkanini av parkeringsplássinum norðureftir er gjørt og góðkent av kommununi.

Ferðslunevndin 13. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-02-2023.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Nevndin tekur undir við FeN 13-02-2023.

Tekniska Nevnd 15. februar 2023:
Nevndin tekur undir við UBN 13-02-2023.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Nevndin tekur undir við TN 15-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Tilmælið frá FíN 21-02-2023 einmælt samtykt.

14/23
22/00531-17 Umskipan av matr.nr. 1646i undir Hamri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	10/23
2 Havna- og Vinnunevndin	15.02.2023	8/23
3 Fíggjarnevndin	21.02.2023	14/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	14/23

22/00531-17 Umskipan av matr.nr. 1646i undir Hamri

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini 2. feb. 2023 verður greitt nærri frá málinum.

Í stuttum snýr málið seg um eitt ynski um umskipan av matr.nr. 1646i, soleiðis at kommunan yvirtekur lendi, svarandi til eina 2,5 metra breiða ál framvið vesturmarkinum, og afturfyri letur umsøkjaranum 23 metrar suðureftir



Tekniska umsiting hevur hesar viðmerkingar til uppskotið um makaskifti:
Sum nevnt frammanfyri, hevur Looknorth goldið fyri 163 m^2 ov nógv fyri matr.nr. 1646i. Við hesum 163 m^2 + 443 m^2 móti vesturmarkinum letur Looknorth Klaksvíkar kommunu 606 m^2 afturfyri teir 1032 m^2, teir fáa lagt aftruat ogn síni suðureftir. Munur Looknorth til góðar: 426 m^2.

Á aktuella økinum sunnanfyri matr.nr. 1646i er uppskot um staðseting av trafostøð. Møguleikin fyri aðrari staðseting á øki, sum ikki liggur í beinari linju við byggiøki, verður kannaður.
Meirøkið suðureftir gevur Looknorth møguleika at rúma kravdum parkeringsplássum á egnum øki.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Løgtingslóg nr. 64 um matrikulering og sundurbýti

Fíggjarligar avleiðingar:
Ummatrikulering – mett til kr.15.000,- konterast av verkætlanini undir Hamri

Tilmæli:
Mælt verður til, at

- Tekniska Umsiting fær heimild til at samráðast um makaskifti við útgangsstøði í omanfyrinevnda uppskoti uppá 606 m^2 mótvegis 1032 m^2 - tó so, at miðað verður eftir, at víddirnar hvønn vegin koma at liggja so nær sum møgligt.
- At umrødda lendið sunnanfyri matr.nr. 1646i verður latið, sum tað liggur. – Møgulig kommunal luttøka í kostnaðinum fyri byggibúning verður at taka upp sum serstakt mál, tá/um hetta gerst aktuelt.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-02-2023.

Havna- og Vinnunevndin 15. februar 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 13-02-2023

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Nevndin tekur undir við HaVN 15-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Tilmælið frá FíN 21-02-2023 einmælt samtykt.

15/23
22/00847-17 Umsókn um frávik frá byggilinju - matr. nr. 1646i, Klaksvík - Looknorth

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.02.2023	6/23
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	11/23
3 Havna- og Vinnunevndin	15.02.2023	9/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	15/23

22/00847-17 Umsókn um frávik frá byggilinju - matr. nr. 1646i, Klaksvík - Looknorth

Frágreiðing um málið:
Vísandi til mál *22/00531-17* um *umskipan av matr. nr. 1646i Undir Hamri*, verður søkt um frávik í samband við, at P/f Looknorth ætlar at byggja nýggjan virkisbygning innanfyri frástøðu á loyvdu 3 metrarnar frá vegmarkinum. Hetta kemst av tí, at prosjektið hjá Looknorth var, at bygningurin skuldi byggjast á markið ímóti beninum og verða 4,5 metrar frá vegmarkinum. Síðani hevur tekniska fyrisiting staðfest, at frástøða frá bygging og til markið á vestursíðuni má verða í minsta lagi 2,5 metrar fyri at hava møguleikan at viðlíkahalda og reinsa veitina. Tískil er alt prosjektið flutt 2,5 metrar ímóti vegnum, og verður tískil frástøðan frá vegnum og til bygningin 2 metrar.



Bláa linjan, ið gongur í gjøgnum útbygningin á eystara bygninginum, er útveggurin á veghæddini. Frástøðan frá vegmarki og til bygningin, á veghæddini, verður 4 metrar. Frástøðan frá veghæddini og til

bygningin á 1. hædd verður 2 metrar.

Lógargrundarlag:
Ásetingar fyri øki B1, Almenna byggisamtyktin og BK 17

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Vísandi til serligu umstøðurnar, mælir tekniska fyrisiting til at játta umsóknini um frávik, og at byggjast kann 2 metrar frá vegmarkinum, og at útveggurin á veghæddini verður í minsta lagi 3 metrar frá vegnum.

Ferðslunevndin 13. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-02-2023.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Nevndin tekur undir við FeN 13-02-2023.

Havna- og Vinnunevndin 15. februar 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 13-02-2023

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Tilmælið frá HaVN 15-02-2023 einmælt samtykt.

16/23
22/00888-3 Sveisirúm til Smiðjuna - flyting av óbúktari játtan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	15.02.2023	10/23
2 Fíggjarnevndin	21.02.2023	9/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	16/23

22/00888-3 Sveisirúm til Smiðjuna - flyting av óbrúktari játtan

Frágreiðing um málið:
Í mai 2022 viðgjørdi TN eitt mál um eitt nýtt sveisirúm til kommunalu smiðjuna. Nevndin valdi at útseta málið, helst av tí orsøk, at nevndir og býráð – júst um tað mundið - hugdu eftir møguligum sparingum innan rakstur og íløgur.

Fundur hevur verið millum avvarðandi partar, har niðurstøðan varð, at málið hevur meira skund nú, og tí er neyðugt at leggja málið serstakt fyri við einari umbøn, um at málið verður loyst. Orsøkin er, at starvsfólk tola ikki umstøðurnar, sum standast av sveisiarbeiði.

Á fundinum varð eisini umrøtt, hvussu peningur kann fáast til vega til sveisirúmið. Kostnaðurin av sveisirúminum er í mai 2022 mettur til 488 tkr. uttan meirvirðisgjald. Kostnaðurin er nú mettur til 510 tkr. Tað er uml. 540 tkr. við kommunalum meirvirðisgjaldi. Møguleikin at flyta óbrúkta rakstrarjáttan í 2022 fram varð nevndur. Smiðjan hevur í 2022 eitt væntað avlop upp á 478 tkr.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Um tikið verður undir við málinum og fíggingini, so verður neyðugt at samtykkja, at rakstraravlopið hjá Smiðjuni í 2022 verður flutt fram til fíggjarætlanina fyri 2023, sum ein avseting innan "Íløgur Smiðjan" ella "Fastognir Íløgur". Talan verður um eykajáttan, har íløgusíðan á fíggjarætlanini fyri 2023 verður hækkað við 478 tkr. Aftur at hesum er neyðugt við einari øking av íløguupphæddini, soleiðis at salmaða játtanin verður 540 tkr.

Tilmæli:
Fundarniðurstøðan var sum nevnt, at talan er um eitt skundmál. Tí fer fyrisitingin við hesum at mæla til, at málið verður loyst skjótast til ber. Heitt verður á viðkomandi nevndir um at taka støðu til málið og møguliga við at taka málið við í viðgerðina í mars, tá framflytingar verða gjørdar.

Tekniska Nevnd 15. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-02-2023, og at málið verður tikið við til viðgerðina í mars av framflytingum.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við TN 15-02-2023.
Ein minniluti, JS og TJL, mælir til, at heildarætlan verður gjørd fyri framflytingar í mars umfarinum.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Einmælt samtykt at beina málið aftur í umsitingina til møguliga at leggja fram aftur í mars umfarinum.

17/23
22/01562-8 Byggibúning ísv. hotellvirksemi í miðbýnum – kostnaður og sáttmáli

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	15/23
2 Havna- og Vinnunevndin	15.02.2023	K-3/23
3 Tekniska Nevnd	15.02.2023	K-3/23
4 Fíggjarnevndin	21.02.2023	11/23
5 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	17/23

22/01562-8 Byggibúning ísv. hotellvirksemi í miðbýnum – kostnaður og sáttmáli

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 3. feb. 2023.

Í samband við klárgerð av økinum, har miðbýarhotell skal staðsetast, hevur umsitingin havt fundir við felagið "Sp/f 31. oktober 2022", sum skal standa fyri verkætlanini. Afturvendandi á fundunum er, hvussu ein evt. avtala millum felagið "Sp/f 31. oktober 2022" og Klaksvíkar kommunu skal síggja út.
Ein møguleiki er, at Klaksvíkar kommuna rindar eina upphædd fyri klárgerð og liðugtgerð av økinum til "Sp/f 31. oktober 2022", og síðani standa teir fyri at fáa økið gjørt.

Ein kostnaðarmeting uppá at gera økið byggibúgvið og liðugt rundanum ljóðar upp á 19,2 mió.kr. u/mvg.
Í hesari kostnaðarmeting er kanalin millum hotellið og Føroya Bjór eisini tikin við, tí er talan um eina

umfatandi verkætlan; kanalin og økið framvið kostar áleið 14 mió kr. u/mvg.
Tað ber til at bíða við at gera vestursíðuna av kanalini, so kostar hetta 5,3 mió kr. minni, men avleiðingin av hesum verður tann, at økið verður ikki liðugt. "Sp/f 31. oktober 2022" ynskir, at alt verður gjørt samstundis, soleiðis at alt er klárt, tá hotellið letur upp.

Støðið verður tikið í kostnaðarmetingini á uml. 19,2 mió. kr. u/mvg í samband við at orða ein sáttmála og gjaldsavtalu, og tí biður umsitingin um heimild til at fara undir at orða ein sáttmála og gjaldsavtalu áljóðandi 19,2 mió kr. u/mvg við "Sp/f 31. oktober 2022". Tó skal fyrivarni takast fyri møguligum meirútreiðslum, hetta verður tikið upp í samband við samráðingarnar. Endaliga uppskotið verður lagt fyri Klaksvíkar býráð til góðkenning tann 23. mars 2023.

Lógargrundarlag:

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin peningur er settur av til endamálið á fíggjarætlanini fyri 2023.
Út frá fyriliggjandi kostnaðarmeting, so skal Klaksvíkar kommuna brúka 19,2 mió. kr. uttan mvg. til at gera økið byggibúgvið og liðugtgerð rundan um bygningin við tilhoyrandi kanal.
Felagið "Sp/f 31. oktober 2022" er sinnað at standa fyri at fáa partin hjá Klaksvíkar kommunu framdan, við tí at Klaksvíkar kommuna rindar sín part av verkætlanini í 2024 og 2025, soleiðis at hotellið kann lata upp til ásettu tíð, sum er aríl 2025.

Tilmæli:
Mælt verður til at samtykkja ein karm áljóðandi 19,2 mió.kr. til at fremja verkætlanina, og at parturin hjá Klaksvíkar kommunu verður goldin í 2024 og 2025.
Mælt verður eisini til at geva umsitingini heimild at fara undir at orða ein sáttmála og gjaldsavtalu áljóðandi 19,2 mió.kr. u/mvg við "Sp/f 31. oktober 2022" við teirri fyritreyt, at sáttmáli og gjaldsætlan verða løgd fyri Klaksvíkar býráð til góðkenningar tann 23. mars 2023.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Ein meiriluti, GvK, OáL og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-02-2023.
Ein minniluti, JS og SVJ, tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-02-2023, og mælir til, at 2 mió.kr. verða settar av í 2023 við eini hækking av inntøkunum av sølu av lendi á Fossum, vísandi til samtykt ísv. fíggjarætlanararbeiðið fyri 2023.

Havna- og Vinnunevndin 15. februar 2023:
Málið verið til kunningar.

Tekniska Nevnd 15. februar 2023:
Málið verið til kunningar.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutanum í UBN 13-02-2023.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við minnilutanum í UBN 13-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælini frá UBN 13-02-2023 og FíN 21-02-2023; tey fullu við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB); ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælini frá UBN 13-02-2023 og FíN 21-02-2023; tey vórðu einmælt samtykt.

18/23
23/00180-1 Tunnilsgrót frá Norðhavnini til hotellverkætlanina

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	15.02.2023	6/23
2 Fíggjarnevndin	21.02.2023	12/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	18/23

23/00180-1 Tunnilsgrót frá Norðhavnini til Hotel verkætlanina

Frágreiðing um málið:
Felagið sp/f "31.10.2022 handan hotellverkætlanina hevur sett fram ynski um at kunna fáa tunnilsgrót, sum eftir ætlan skal nýtast til útfylling í Norðhavnini. Tað er mett til at skula brúkast 5000 rúmmetrar av gróti til útfylling fyri hotellbyggingini.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan 2023

Fíggjarligar avleiðingar:
Virðið av grótinum, sum verður tikið frá útfyllingini í Norðhavnini, skal latast aftur til verkætlanina í Norðhavnini.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at lata 5000 rúmmetrar av tunnilsgróti til byggibúning til hotellið.

Havna- og Vinnunevndin 15. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2023, og at virðið av grótinum frá Norðhavnini til hotelverkætlanina verður at flyta aftur til verkætlanina í Norðhavnini (HV005) innan 01-06-2023.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Ein meiriluti, KHJ, OáL, JS og TJL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2023.
Ein minniluti, ASJ, tekur undir við HaVN 15-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá FíN 21-02-2023; tað fall við 2 atkvøðum fyri (ASJ og ÓML) og 9 atkvøðum ímóti (KHJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, JS, SVJ og TJL).

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 21-02-2023; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, JS, SVJ og TJL) og ongari atkvøðu ímóti; ASJ atkvøddi ikki.
ÓML var ikki á fundinum, tá henda seinna atkvøðugreiðslan fór fram.

19/23
23/00181-1 Tunnilsgrót frá Norðhavnini til útfylling til bátafelagshús

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	15.02.2023	5/23
2 Fíggjarnevndin	21.02.2023	13/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	19/23

23/00181-1 Tunnilsgrót frá Norðhavnini til útfylling til bátafelagshús

Frágreiðing um málið:
Bátafelagið í Klaksvík hevur sett ynski fram um at fáa eitt felagshús, umframt eitt tilhoyrandi sølutorg. Tær staðsetingar, sum hava verið eftirhugdar til endamálið, hava allar verið útfyllingar út á vágna, eins og seinasta staðsetingin sum verður umrødd er tað.
Ætlanin er at fylla út uml. 1200 fermetrar útfrá EFFO yvir ímóti nýggja róðrarneystinum, fyri síðani at byggja á hetta stykkið. Hendan útfyllingin er mett at krevja umleið 4000 rúmmetrar av gróti.
Ísv. at grót frá tunnilinum norður um fjall, sum í løtuni liggur í Árnafirði skal flytast til Norðhavnina til nýggju útfyllingina kundu 4000 rúmmetrar av hesum verið oyramerktar til at brúkt til útfyllingina aftan fyri EFFO tá umhvørvisgóðkenningin fyrilá.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Virðir fyri uml. 750.000 av gróti verða fluttar frá íløguni á Norðhavnini til nýggja íløgu bátafelagshús.

Tilmæli:
Mælt verður til at brúka 4000 rúmmetrar av tunnilsgróti til útfylling fyri bátafelagshúsi.

Havna- og Vinnunevndin 15. februar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-02-2023

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, OáL og TJL, tekur undir við HaVN 15-02-2023.
JS tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 21-02-2023; tað varð samtykt við 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, TJL og ÓML) og ongari atkvøðu ímóti; JS og SVJ atkvøddu ikki.

20/23
23/00174-1 Flyta íløgu til fimleikarhøll til rakstrarstaðið stuðul til ítrótt – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	14.02.2023	5/23
2 Fíggjarnevndin	21.02.2023	8/23
3 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	20/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.03.2023	

23/00174-1 Flyta íløgu til fimleikarhøll til rakstrarstaðið stuðul til ítrótt

Frágreiðing um málið:
Á fíggjarætlanini fyri 2023 er sett 450.000 av í íløgum til tekning/projektering av fimleikarhøll. Hetta er ikki nóg mikið til at gera eina fullfíggjaða projektering, samstundis sum ein verulig verkætlan við fimleikarhøllini tíverri er nøkur ár úti í framtíðini, orsakað av fíggjarligu støðuni hjá kommununi. Samstundis hevur Fimleikarfelagið riggað seg til, at fyribils húsast í øðrum hølum á Faktorsvegnum og hava tí tørv á stuðuli til at gera teir karmarnar meiri hóskandi til sítt virksemi.
Tað er tí meiri hóskandi at flyta íløguna, sum er sett av til *projektering av fimleikarhøll*, til *stuðul til ítrótt*, har ein partur kann nýtast til stuðul til Fimleikarfelagið.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan 2023

Fíggjarligar avleiðingar:
Kr. 450.000 verða fluttar frá íløgum til rakstur.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur undir við at flyta íløgujáttanina til fimleikarhøll til raksturin m.a. til at stuðla Fimleikarfelagnum við leigukostnaði og dagføringum av bygningi.

Mentanarnevndin 14. februar 2023:
Ein meirluti, GvK, ASB, ÓL og JC taka undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2023
Ein minniluti, SVJ, tekur støðu á komandi býráðsfund.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutanum í MeN 14-02-2023.
Ein minniluti, TJL og JS, mælir til at halda fast við, at kr. 450.000 verða settar av til íløgur til tekning/projektering av fimleikarhøll, og mælir til at onnur játtan verður fingin til vega til fyribilshølir til Fimleikafelagið.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið frá FíN 21-02-2023; tað fall við 3 atkvøðum fyri (JS, SVJ og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB); ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 21-02-2023; tað varð einmælt samtykt.

21/23
23/00175-3 Umsókn um prinsipp byggiloyvi til afturatbygging av aulu - matr. nr. 752b - Tekniski Skúli í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.02.2023	20/23
2 Mentanarnevndin	14.02.2023	13/23
3 Fíggjarnevndin	21.02.2023	16/23
4 Klaksvíkar Býráð	23.02.2023	21/23

23/00175-3 Umsókn um prinsippbyggiloyvi til afturatbygging av aulu - matr. nr. 752b - Tekniski Skúli í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Brim arkitektar søkja vegna Tekniska Skúla í Klaksvík um loyvi til at byggja eina aulu út frá verandi bygningi. Talan er um eina víðkan á 477 m^2.
Staðsetingin av afturatbyggingini er á kommunala parkeringsplássinum eystanfyri verandi bygning, matr.nr. 752c, og oman ímóti rennibreytini, matr.nr. 712a. Bygging á økinum er treytað av, at kommunan letur Tekniska Skúla lendið – uml. 860 m^2



Lógargrundarlag:
Ásetingar fyri øki C2, almenna byggisamtyktin og BK 17

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar, um lendið verður latið Tekniska Skúlanum. Inntøka á áleið kr. 352.000,-, um lendið verður selt.

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir til at játta umsóknini, treytað av, at Tekniski Skúli fær tilognað sær meirøki á matr. nr. 752c og 712a. Tískil má støða takast til, um lendið skal seljast ella latast Tekniska Skúla.
Vanliga verða lagdir kr. 300,-/m^2 afturat fasta prísinum uppá kr. 110,-/m^2, tá talan er um asfalterað øki.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. februar 2023:
Nevndin tekur undir við at selja økið fyri 410 kr/m^2.

Mentanarnevndin 14. februar 2023:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 13-02-2023.

Fíggjarnevndin 21. februar 2023:
Nevndin tekur undir við MeN 14-02-2023.

Klaksvíkar Býráð 23. februar 2023:
Tilmælið frá FíN 21-02-2023 einmælt samtykt.

Fundurin lokin kl. 22:10

Karl H. Johansen

Atli S. Justinussen

Jógvan Skorheim

Gunvá við Keldu

Oddmar á Lakjuni

Jóhanna Christiansen

Eyðstein Ó. Poulsen

Annika S. Biskopstø

Óli M. Lassen

Signhild V. Johannesen

Tummas J. Lervig